INNLATING Í STØDDFRØÐI

Nr. 3

8.fl.

Latast inn: 6. & 7. november 2023

(G.G. Innlatingin skal latast inn í leysum, puntaðum A4 ørkum og í einum plastlumma. Minnist til at skriva navn á allar síðurnar í innlatingina.
Sera týðandi at minnist til millumrokningar)

STØDDFRØÐI INNLATING

at lata inn: ei.fl 6. november & h. fl. 7. november

Nr. 3

1. Handilsrokning & prosent

Zimme musikkhús prísir:	
Bassforsterkari	**3795 kr.**
El gittarari	**2595 kr.**
Akustiskan gittari	**4190 kr.**
Keyboard fyri	**2690 kr.**
ljóð- og sanganlegg	**8990 kr.**
Mikrofon	**990 kr.**
Mikrofon stativ	**1485 kr.**
Trummusett	**10000 kr.**

Birna, Joanna, Elly og Aage gingu í 8. fl. Tey høvdu fingist við at spæla tónleik í skúlanum. Tey gjørdu nú av at gera sítt egna orkestur. Tey hugdu at ymiskum, ið einum orkestri tørvar, og tey ætlaðu at keypa: ein bassforsterkara, tveir El gittarar, ein akustiskan gittara, eitt keyboard, eitt ljóðanlegg, tríggjar mikrofonir, trý stativ, eitt trummusett og leidningar og annað fyri 3595 kr.

s

a.) Hvussu nógv kostaði hetta teimum tilsamans?

Tey skuldu gjalda 30% av kostnaðinum fyri ljóðførini í hondina.

b.) Hvussu nógv skuldu tey gjalda í hondina?

Tað, sum eftir var at gjalda, skuldu tey gjalda aftur uppá 1 ár.

c.) Hvussu nógv skuldi hvør teirra gjalda um mánaðin, hetta eina árið?

Orkestrið kallaði seg Rullandi Steinar. Tey ætlaðu at selja atgongumerki fyri 80 kr. stk. Til konsertinar høvdu tey leiga eitt høli, ið tók 45 fólk.

d.) Hvussu nógvar fullsettar konsertir skuldu tey hava, áðrenn tey fingu yvirskot?

2. Ferð og strekki

Strekkið (s) = ferð (v) x tíð

Rullandi Steinar ætlaðu sær til Danmarkar at spæla konsertir. Men Aage vildi vita, hvussu skjótt flogfarið hjá Atlantsflogi fleyg, áðrenn hann játtaði at koma við.

Flogfarið hjá Atlantsflog fleyg úr Vágunum kl. 12:25 og lendi í Keypmannahavn kl. 14:40. Teinurin er 1343 km langur.

a.) Hvussu skjótt fleyg flogfarið hjá atlantsflog?

Aage kom bert við á konsertferð í danmark, um flogfarið fleyg skjótari enn 500km/t.

b.) Fór Aage við á konsertferð?

3. Navn á bólkinum

Á einari konsert gjørdi bólkurin eina spurnarkanning, um bólkurin skuldi skifta navn, ella varðveita tað tey høvdu.

Her eru leparnir við nøvnum, ið fólk atkvøddu fyri.

a.) Ger stabbamynd yvir nøvnini, og vís hvat navn vann?

4. Algebra og brot:

Í einum steðgi fóru orkesturlimirnir at loysa líkningar og umstytta framsagnir:

Loys líkningarnar:

a.) $3x + 5 = 2x + 10$ b.) $14 + 2x = - 6 - 3x$ c.) $4x + 7 = 5(1 + x)$

Umstytt framsøgnina:

d.) $(4 + a)(4 - a) + 3(2a - 1)$ e.) $(a + 2b)^2$ f.) $\frac{1}{3}(6a - 9) - 3(a + 2)$

Rokna:

g.) $4 \cdot 3\frac{3}{6}$ h.) $5 \cdot 4\frac{1}{10}$ i.) $3 \cdot 2\frac{2}{3}$

5. Ferðaætlan

Birna var farin suður til Sumba at vitja sína gomlu blindu langommu. Men bólkurin skuldi hava útgávu konsert eitt fríggjakvøld kl. 20.00 í Klaksvík. Tey skuldu møta ein tíma áðrenn. Tað tekur 35 min. hjá langommu Birnu at koyra úr Sumba til Trongisvág (Har Smyril leggur at).

Birna tekur síðani bygdaleiðir úr Tórshavn til Klaksvíkar.

a.) Nær skulu Birna og omman í seinasta lagi fara úr Sumba, um hon skal verða í Klaksvík áðrenn kl. 19.00 fríggjakvøld?

Omman og Birna sovna, og náa fyrst at koyra úr Sumba kl. 15.12

b.) Nær er Birna so í Klaksvík?

7 Tvøroyri - Tórshavn

Gevið gætur: Akfør skulu vera í biðirøðini í seinasta lagi 20 min. fyri fráferð. Landgongdin til ferðafólk til gongu letur aftur 5 min. fyri fráferð.

Skip: M/F Smyril

Siglingartíð: 2t 05min

7 TVØROYRI - TÓRSHAVN

Av/úr	Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	Leygardag	Sunnudag
Tvøroyri	06:00	07:00	06:00	06.00	07:00		08:30
Tórshavn	08:45	13:00	08:45	08:45	13:00	07:00	11:00
Tvøroyri	11:30	16:00	11:30	11:30	16:00	09:30	17:30
Tórshavn	16:00	19:00	16:00	14:15	18:30	16:00	20:00
Tvøroyri	18:45		18:45	17:30	21:00	18:30	
Tórshavn	21:15		21:15	21:15		21:15	

Framíhjárættir og serligar túrar

Á túrunum av Havnini fríggjadag kl. 13 og av Krambatanga sunnu- og halgidagar eru ofta nógv akfør við.
Á hesum túrum verður heitt á bilførarar at vera á staðnum 1- 1,5 tíma áðrenn fráferð, tí ofta verður koyrt umboð í góðari tíð.

Til túrin kl. 17:30 hósdag hevur farmur framíhjárætt. Túrarnir fríggjadag kl. 16:00 og kl. 18:30, og sunnukvøld kl. 17:30 og kl. 20:00 hava bilar og ferðafólk framíhjárætt.

400 TÓRSHAVN - KLAKSVÍK

Dag	Tórshavn	Kollaf. t.	Oyrarb.	Skálafj.	Søldafjørður	Gøtud.	Leirvík	Klaksv.
x	06:10	06:30	06:55	07:08	07:15	07:25	07:30	07:40
x	07:55	08:15	08:40	08:55	09:00	09:10	09:15	09:25F)
x67	09:20	09:40	10:05	10:20	10:25	10:35	10:40	10:50F)
x7	10:50	11:10	11:35	11:50	11:55	12:10	12:15	12:25F)
x6	12:10	12:30	12:55	13:10	13:15	13:25	13:30	13:40F)
x7	13:50	14:10	14:35	14:50	14:55	15:05	15:10	15:20F)
x6	15:25	15:45	16:15	16.30	16:35	16:45	16:50	17:00F)
x	16:20	16:40	17:10	17:25	17:30	17:40	17:45	17:55F)
x67	17:30	17:50	18:15	18:30	18:35	18:45	18:50	19:00F)
x	18:20	18:40	19:05	19:20	19:25	19:35	19:40	19:50F)
x67	20:40	21:00	21:25	21:40	21:45	21:55	22:00	22:10F)

x = gerandisdagar frá mánadag til fríggjadag
6 = leygardag
7 = sunnudag